# Bygdarráðsfundur

# Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 25.05.2023 kl. 16.30

Á fundi: Janus Thomsen
Ronni Hammer
Niels Olaf Eyvindsson
Eir J. Norðberg
Gunnhild Mortensen
Thorstein Thomsen
Martin í Nesi

Skrivari: Johanna B. Djurhuus

Formaðurin bað um loyvi at taka eitt mál við aftrat – játtað og kemur á skrá sum mál nr. 7.

1. **102-9-2023: Innkomin boð uppá leigu av jørð 2023 - 2027.**

Innkomnu boðini eru:

**Støðlarnar – matr. nr. 390f:**

kr. 1.500,00
kr. 5.000,00

**Í Sondunum – matr. nr. 145a:**

kr. 1.500,00
kr. 2.500,00

**Avgerð**:
Støðlarnar: Einmælt samtykt at leiga jørðina til hægstbjóðandi – kr. 5.000,00.
Í Sondunum: Einmælt samtykt at leiga jørðina til hægstbjóðandi – kr. 2.500,00.

2. **102-43-2023: Góðkenning av roknskapi fyri 2022 .**

Ársroknskapur hjá Hvalbiar Sóknar Kommunu fyri 2022 til góðkenningar. Inntøkurnar frá kommunuskatti og øðrum inntøkum eru tkr. 38.853, rakstrarútreiðslur tkr. 29.835, rentustuðul og rentuútreiðslur tkr. 551 og løguútreiðslur tkr. 1.256. Roknskapurin gevur eitt avlop á tkr. 7.211.

| | **Rakstur:** | | **Løgur:** | |
|---|---|---|---|---|
| §1. Kommunal fyrisiting | tkr. | 2.225 | tkr. | 0 |
| §2. Almanna- og heilsumál | tkr. | 11.662 | tkr. | 0 |
| §3. Børn og ung | tkr. | 6.491 | tkr. | 7 |
| §4. Undirvísing | tkr. | 2.383 | tkr. | 0 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| §5. Mentan og frítíð | tkr. | 1.392 | tkr. | 0 |
| §6. Teknisk mál | tkr. | 2.669 | tkr. | 148 |
| §7. Kommunal virki | tkr. | 3.014 | tkr. | 1.101 |
| **Íalt** | **tkr.** | **29.836** | **tkr.** | **1.256** |

Skattainntøkur vegna eldraøkið eru tkr. 9.289. Rakstrarútreiðslurnar til eldrasamstarvið eru tkr. 9.255 – leiguinntøka av sambýlinum er tkr. 362, nettokostnaður til eldrasamstarv er sostatt tkr. 8.893.
**Fíggjarnevndin 25.05.2023:**
Samtykt varð einmælt at mæla til at góðkenna ársroknskapin fyri 2022.
**Avgerð:**
Roknskapurin fyri 2022 einmælt samtyktur.

3. **102-45-2023: Tilboð frá MTV-Byggivirki uppá afturgerð av túnum vegna kloakkarbeiði.**
Innkomnu tilboðini frá Sp/f MTV-Byggivirki uppá afturgerð av túnum – lendis og stoypiarbeiði:

| | |
|---|---|
| (116 m2) | kr. 70.500,00 uttan MVG |
| (225 m2) | kr. 112.500,00 uttan MVG |

**Tekniska nevnd 22.05.2023:**
Nevndin er samd um at mæla til at taka av tilboðnum kr. 70.500,00 uttan MVG fyri stoyping v.m. av 116 m2 túni. Meirilutin av nevndini er samd um at taka av tilboðnum kr. 112.500,00 uttan MVG fyri stoyping v.m. av 225 m2 túni, men bíða við at gera arbeiðið fyrrenn tey vita meira um vegin gjøgnum Garðsenni.
**Fíggjarnevndin 25.05.2023:**
Einmælt samtykt at mæla til at taka av tilboðnum kr. 70.500,00 uttan MVG fyri stoyping v.m. av 116 m2 túni. Nevndin er ivasom viðvíkjandi stoyping v.m. av 225 m2 túni, um tað í hesum føri er betri at asfaltera økið, tá vegurin í Garðsenni eftir ætlan verður umvældur og asfalteraður.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt at fylgja tilmælunum hjá nevndunum og taka av tilboðnum frá Sp/f MTV-Byggi-virki kr. 70.500,00 fyri stoyping av túni á 116 m2.
Atkvøtt varð um tilmælið hjá meirilutanum í Teknisku nevnd viðv. stoyping av túni á 225 m2. Samtykt varð við 5 atkvøðum fyri at taka av tilboðnum kr. 112.500,00 fyri hetta arbeiðið.

Poul Laust Christiansen kom inn á fundin fyri Janus Thomsen, sum fór út undir viðgerðini av máli nr. 4.

4. **102-44-2023: Tilboð frá Trolvirkinum Bergið uppá ketur til festir.**
Tilboð frá Trolvirkinum Bergið uppá 22 LL ketu til aldubrótara til nýggja bátahylin og flótibrúgv til bátahylin í Nesi kr. 58.000,00 v/MVG.
**Vega- og havnanevndin 20.05.2023:**
Meirilutin í nevndini mælir til at taka av tilboðnum frá Trolvirkinum Bergið kr. 58.000,00 v/MVG.

**Fíggjarnevndin 25.05.2023:**
Samtykt varð einmælt at mæla til at taka av tilboðnum frá Trolvirkinum Bergið kr. 58.000,00 v/MVG
**Avgerð:**
Samtykt varð við seks atkvøðum fyri at taka av tilboðnum frá Trolvirkinum Bergið.

5. **102-46-2023: Tilboð uppá intranet til dagstovnin frá Intra.**
Tilboð uppá barnagarðsnet frá Intra.

| | |
|---|---|
| Intra eingangsgjald (íroknað uppsetan og upplæring v.m.) | kr. 40.000,00 u/MVG |
| Hýsing av servara og flatrate foreldur og starvsfólk (mánaðargjald) | kr. 1.400,00 u/MVG |

**Fíggjarnevndin 25.05.2023:**
Samtykt varð einmælt at mæla til at taka av tilboðnum frá Intra.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt.

6. **102-48-2023: Innkomin tilboð uppá leasing av arbeiðsbilum frá Komfortbilar.**
Tilboðini frá Komfortbilum eru:

| | |
|---|---|
| Isuzu D-Max: | kr. 3.495,00 uttan MVG mánaðarliga í 60 mðr. |
| Fiat Fiorino: | kr. 2.995,00 uttan MVG mánaðarliga í 60 mðr. |

Í báðum førum er byrjanargjald kr. 40.000,00 uttan MVG og endagjald kr. 40.000,00 uttan MVG.
**Fíggjarnevndin 25.05.2023:**
Samtykt varð einmælt at mæla til at útseta málið.
**Avgerð:**
Atkvøtt varð um uppskot frá Ronni Hammer um at taka av tilboðnum frá Komfortbilar uppá leasing av báðum bilunum. Samtykt við seks atkvøðum fyri.

7. **102-49-2023: Umsókn um byggiloyvi til dur á matr. nr. 29g, Hvalba.**
Søkt verður um byggiloyvi til dur á matr. nr. 29g, Hvalba.
**Tekniska nevnd 22.05.2023:**
Nevndin mælir til at fylgja tilmælinum hjá byggimálsviðgeranum og geva byggiloyvi.
**Avgerð:**
Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælinum hjá nevndini og byggimálsviðgeranum og geva byggiloyvi sambært umsókn, givnum upplýsingum og tekningum, treytað av, at byggingin verður framd í fullum samsvari við hjálagda byggiloyvi og treytum annars sambært BK17.

8. **Ikki almenn mál.**

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 19.00

Janus Thomsen Ronni Hammer Niels Olaf Eyvindsson
Eir J. Norðberg Martin í Nesi Gunnhild Mortensen Thorstein Thomsen